## Fekk hval í gørnini

Norski útróðrarmaðurin Roar Andersen fekk ein hvøkk nú um dagarnar, tá hann fór at draga gørnini, sum hann hevði sett á einum firði í Troms. Roar Andersen hevði sett gørn eftir rognkelsum, men hendan dagin hevði ein sildreki vavt seg upp í gørnini. Roar bað myndugleikarnar um hjálp, og tá tað vísti seg at vera vónleyst at bjarga hvalinum, bleiv hann skotin. Sambært bløðunum var sildrekin minst 13 metrar langur og vigaði fleiri tons.



*Nógv fólk stimaðu út á fjørðin at hyggja at hvalinum*

*Mynd: Aftenposten*

## Keypa ikki kópaskinn

Tað gongur so illa hjá grønlendingum at selja kópaskinn, at av teimum 7.000 skinnunum, sum vórðu boðin til sølu á marknaði í Danmark herfyri, bleiv ikki eitt einasta selt. Høvuðsorsøkin er altjóða mótstøða ímóti kanadisku kópaveiðini, og prísurin á kanadisku skinnunum er eisini farin í botn. Finn Karlsen, landsstýrismaður, sigur, at hann ætlar sær at taka málið upp á norðuratlantiska fiskimálaráðharraf undinum á Malta.

# Tørvur á nýggjari høll

**Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, heldur, at tað er tørvur á einari nýggjari ítrótta- og samkomuhøll í høvuðsstaðnum**

ÍTRÓTTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, heldur, at tað er tørvur á einari nýggjari høll, sum lýkur altjóða krøv*

Tórshavnar Býráð hevði í síðstu viku fund um hallarviðurskiftini í kommununi.

Tað hevur leingi verið greitt, at Ítrótta- og samkomuhøllin á Hálsi hevur ábøtur fyri neyðini, men í øllum tí tosinum kom spurningurin fram, um tað ikki hevði verið líka snilt at bygt eina nýggja høll í staðin fyri.

Fyri at fáa greiði á tí spurninginum kallaði Heðin Mortensen, borgarstjóri, inn til fundar, har bæði politikarar og embætisfólk vóru við.

Heðin Mortensen sigur, at fundurin gav greiðar ábendingar um, at tørvur er á einari nýggjari høll.

- Men tað skal ikki verða antin ella. Tørvurin á einari nýggjari høll er eyðsýndur, men høllin á Hálsi skal eisini hava neyðugu umvælingina, sigur Heðin Mortensen.

Hann heldur, at tað hevði verið upplagt at bygt eina nýggja ítrótta- og samkomuhøll í Marknagili, nú landið hevur gjørt av at byggja ein stóran skúladepil har.

- Tað hevði verið upplagt, at landið saman við Tórshavnar Kommunu bygdi eina slíka høll í Marknagili. Tað fara at ganga einir 1200 ungdómar har úti, og teir kundu so nýtt høllina um dagin, meðan kommunan yvirtók hana eftir skúlatíð, sigur Heðin Mortensen.

### Stórsentur í Stórutjørn

Tað hevur verið spurnartekin sett við, hví Tórshavnar Kommuna ikki byggir eitt stórsentur líknandi Clickimin sentrinum í Lerwick, men tað heldur Heðin Mortensen ikki er aktuelt longur.

- Tað er við í Stórutjørn verkætlanini, so tað hevði ikki verið skilagott av kommununi eisini at gjørt eitt. Vit skulu nú taka støðu til, í hvønn mun vit skulu verða við í sentrinum við Stórutjørn, um tað bara verður í svimjihøllini ella í øðrum eisini, sigur Heðin Mortensen.

Men hann er sannførdur um, at tað verður neyðugt hjá kommununi at skapa karmarnar fyri, at vit kunnu skipa fyri altjóða kappingum, og tað er komið fram, at verandi hallir lúka ikki altjóða krøvini til eitt nú flogbólt.

- Sum nevnt hevði tað verið ynskiligt, at landið saman við okkum bygdi eina høll í Marknagili, men eitt er vist, vil landið ikki verða við, mugu vit gera tað sjálvi, sigur Heðin Mortensen.

Hann heldur, at tað ræður um at hyggja stórt upp á tingini, og í løtuni arbeiðir umsitingin við at finna út av, hvat ein slík nýggj ítrótta- og samkomuhøll kostar. Tí at hon kemur, tað liggur í kortunum.

# Grøna húsið sum krígssavn

**Í nøkur ár hevur verið arbeitt við at fáa eitt krígssavn í Vágoy. Orsøkin er tann sjálvsagda, at undir seinna heimabardaga vóru einir 10000 hermenn í oynni, tá ið teir vóru mest**

KRÍGSSAVN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú hevur Vága Kunningarstova sent vinnuráðharranum Bjørt Samuelsen eina áheitan og umbøn viðvíkjandi ”Operation Room” - sum er Grøna húsið við Flogvøllin.

Vága Kunningarstova vísur á, at Fornminnissavnið hevur havt vitjan av einum breta sum var her undir seinna heimsbardaga og hevur bretin givið lyfti um at hjálpa við at finna gomlu tekningarnar av bygninginum, so hann verður settur í uppruna stand.

- Ætlanin við húsinum er, at tað skal verða ”operational Room” fyri ferðavinnuna í Vágoy. Vága Kunningarstova kemur kanska at liggja har, sigur Vága Kunningarstova.

Vága Kunningarstova viðmælir eisini, at allar ognirnar - Grøna húsið, Tornið og økið rundanum - verður latið einum felagi ella stovni í Vágoy, skrivar vágaportalurin.

